**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Feriuavloysari fyri ergoterapeut

Ergoterapiin á Landssjúkrahúsinum søkir eftir feriuavloysara fyri ergoterapeut 30 t. um vikuna á Somatisku deild. Starvið er leyst at søkja til setan 14. august 2006 til 30. september 2006.

**Vit kunnu bjóða tær** eitt arbeiðspláss í menning við fakligum og persónligum avbjóðingum, har tú fær møguleika fyri at luttaka í okkara ergoterapeutiska toymi og í einum tvørfakligum toymi.

**Ergoterapiin fevnir um** tvær deildir ávíkavist Psykiatrisku og Somatisku deild og hava vit ein felags leiðara, sum í løtuni hevur sína dagligu gongd á Psykiatrisku deild. Á Psykiatrisku deild eru 4 ergoterapeutar. Á Somatisku deild eru 3 ergoterapeutar.

Á Landssjúkrahúsinum verður í løtuni arbeitt við at broyta leiðslubygnaðin. Hetta inniber, at Ergoterapiin og Fysioterapiin eru løgd um til eina rehabiliteringseind undir leiðslu av medisinsku depilsleiðsluni.

**Arbeiðsuppgávur**
Í Ergoterapiini brúka vit eina kanadiska fyrimynd sum fatanargrundarlag.

**Ergoterapeuturin kemur at luttaka í viðgerðini av**
- innløgdum sjúklingum, (hemiplegi, RA og aðrar medisinskar sjúkur)
- ambulantum brúkarum (hondkirurgiskir)
- ráðgeva og vegleiða sjúklingum og avvarandi um broytingar í heiminum.

**Vit leggja dent á** persónligar eginleikar, so sum greiða talu og gott arbeiðslag.

**Nærri fæst at vita** um starvið og deildina á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum: www.lsh.fo undir »leys størv« ella við at venda sær til Súsannu Winther Poulsen, leiðandi ergoterapeut, tlf. 225291, ella Súnu Mørk tlf. 515589.

**Løn-og setanartreytir** sambært sáttmála millum Ergoterapeutfelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Skrivlig umsókn** við avriti av prógvi og øðrum upplýsingum skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin** er 7. august 2006 kl.12.00

# Leiðari til barnagarðin á Gásamýri

Leirvíkar kommuna søkir eftir dagstovnaleiðara til barnagarðin at byrja 1. september 2006.

Umsøkjarin skal hava námsfrøðiliga útbúgving. Talan er um fulltíðarstarv, men møguleiki er fyri niðursettari arbeiðstíð.

Í barnagarðinum á Gásamýri eru 32 børn í aldrinum 3-6 ár og í frítíðaransingini eru 24 børn, sum ganga í 1. og 2. flokki.

**Vit ynskja at tú:**
- hevur hug og hegni at leiða, dugir at samskipa og ert fyrikomandi
- hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu
- hevur hug til at skapa og seta dám á okkara barnagarð
- kanst arbeiða sjálvstøðugt.

Lønin er sambært sáamála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 443006 ella til borgarstjóran tlf. 743006.

Umsókn við avritum av prógvum og møguligum ummælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi **mánadagin 21. august 2006.**

**Leirvíkar Kommuna**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

# Húsavørður til P/F Fastogn

**P/F Fastogn**
*P/F Fastogn varð stovnað í 2003 og endamálið við felagnum er at gera íløgur í fastognir. Leiguvirksemið í dag umfatar sølumiðstøðir, skrivstovuhølir og framleiðslubygningar.*

Eitt hálvtíðarstarv sum húsavørður hjá P/F Fastogn er leyst at søkja. Søkt verður eftir einum fólki, sum kann átaka sær uppgávuna at viðlíkahalda og gera minni umvælingararbeiði á bygningarnar hjá felagnum.

**Um teg:**
- Tú ert handverkari og/ella handaligur
- Tú ert røkin
- Tú ert álítandi
- Tú hevur koyrikort

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt starv sum er áleið hálva tíð, sum møguliga kann gerast eitt fulltíðarstarv
- Eitt sjálvstøðugt starv
- Løn sambært avtalu.

Hevur hetta tín áhuga, ert tú vælkomin at ringja og fáa meiri upplýsingar um starvið við at venda tær til Gordon Rajani á tlf. 351519 og 551519.

Skrivlig umsókn kann sendast til:

**P/F Fastogn**
Att.: Gordon Rajani
Bókbindaragøta 8
Boks 3090 · FO-100 Tórshavn

## TIL SØLU

### BILUR

**Jeep Grand Cherokee 3,1**
Diesel, aut. gear, vøruvognur.
Árg. juni 2001, km 123.000.
Í sera góðum standi.
**Kr. 150.000,-** + mvg.

### BÁTUR

**Stern Power glasfibur frá USA**
30 fót skjótt gangandi, uml.
25 míl, V8 260 HK Diesel.
Árg. 1981
Í sera góðum standi.
**Kr. 300.000,-**

**Ring og fá meira at vita á tlf. 231580**

## KRAMBAFÓLK

Til Bakaríið í miðbýnum og Statoilstøðini á Argjum verður søkt eftir fyrikomandi og røskum

**krambafólki**

til skiftandi vaktir.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Bárður Olsen á tlf. 21 53 87 millum kl. 15:00 og 18:00.

**P/f Vørður**
Hoyvíksvegur 65
Postboks 1048
110 Tórshavn

# Summarferia

Vit hava stongt vegna summarferiu frá 31. juli til og við 20. august.

**Harraklipping í Vágsbotni**

# Summarfrí

Kommunuskrivstovan er stongd vegna summarfrí í viku 30 og 31.

**Sjóvar kommuna**